

# Er ÍF á veg móti fyrsta føroyameistaraheiti sínum?

*Fyrstadeildarliðið hjá ÍF vann sunnudagin uppibornan 4—2 sigur á føroyameistarunum HB, og liggur nú á odda í landskappingini*

Um tað var rakar, sum áðrenn dystin sunnudagin millum HB og ÍF tvaðst í, um ÍF verulega hevði nakran møguleika at vera við í stríðnum um føroyameistaraheitið í 1. deild, tá var hann aftanat dystin vinur í, at tað heldur er umvent og tað verður ringt hjá nakrum av hinum liðunum at taka stig frá ÍF í ár.

Um tey halda fram við sínum góðum álopspæli, sum sunnudagin, eru møguleikar teirra fyri at vinna fyrsta føroyameistaraheiti í 1. deild nakrantíð, sera stórir.

**Vánalig líkindi**

Veðrið var henda dagin ikki tað besta til fótbólt-leik. Tað hevði regnað allan dagin og var ovari vallar í Gundadali vátur og lógu stórir hyljur á honum. Hetta kom sjálvsagt at darva spælinum einahelst hjá HB, men hvørt vánaligan líkindi leikti ÍF ein tann besta dyst teirra nakrantíð í Gundadali.

**Álopsleikur**

ÍF leikti allan dystin á gerandi álopsleik, og var tað ein fræ, at siggja tær góðu sóknarteigarnar frá Mentharði Dalbú og Birgiri Thomsen, ið leikti ein sera góðan dyst.

Eisini verjan hjá ÍF leikti hendan dyst — í mun. til HB-verjuna — gott og varð hetta eisini av, at fyrra mál Hílo var eitt langskot, ið ÍF-málverjin Ove Joensen neyvan ná, áðrenn tað sat í netinum, meðan tað seinna kom í seinasta mun av dystinum, tá ÍF verjan gjørdi tað mistak at taka av lætti uppá uppgávuna — dystartíð var jú vunnin — og slík mistøk hoyra gerast dýr, so ikki kann roknast við at hetta fer at hendla aftur í teirri komandi dystunum.

Torfest er at nevna nakran ÍF-leikara fram um hinar, ti allir høvdu ein góðan dyst, men eftir mínum tykki sparkti, sum fyr nevnt, Birgir Thomsen, á tveimi vongi, ein stórran dyst, meðan tað var eins og ein so góður leikari, sum Jan Nielsen, á hegru vongi ikki fekk so nógv burturúr, sum hann er vanur. Annars er hørt at siga, at allir ÍF-leikararnir eyndu góðan leik og at hetta vegna tað — gleðiligu sóknarfeildirnir er neyvan meira enn 21 ár — hevur eller mangfeldar at seta dám á framtíðarliðini av føroyskum 1. deildarfótbólti komandi árini.

Ungu HB-liðið sær út til at falla alt ov skjótt í fatt. Seinasta mikudag leikti tað javnt móti B36 og var tað tá B36, ið skeyt harðast, men hendu dagin komu teir ongantíð fyri nøg mótí skjótt ÍF-leikarunum, ið reyndu at bróta



var dystartalið fjúrtan.

Meinhardt Dalbúð var eyðsýndur toppskjútti. Hann skoraði seytjan mál ella meiri enn eitt mál í miðal.

-Vit vunnu ellivu dystir, og tríggir endaðu við janvleiki. Fyrsti javnleikurin var í øðrum umfari, tá ið vit í ikki frítt av kava vóru á Sevmýri. Mín góði vinur Trond Nolsøe legði TB framum eftir eitt lítið korter, og tað eydnaðist mær at javna, tá ið eitt lítil korter var eftir. Vit roknaðu TB at vera millum stóru favorittarnar at vinna FM, tí TB átti so nógvar góðar spælarar.

At Sosialurin longu eftir fimta umfar róði framundir, at ÍF var møguligur FM vinnari, órógvaði kanska ungu fuglfirðingarnar:

-Kanska var tað soleiðis, tí í tveimum teimum næstu dystunum endaði tað javnt – á heimavølli ímóti VB og á útivølli ímóti B36.

Men so vunnu tit sjey dystir á rað og harvið FM?

-Ofta var tað tætt, men hvørja ferð varð tað so at siga stong inn hjá okkum. Samanhaldið var framúr, og hetta var eitt av árunum, tá ið vit ikki vóru darvaðir av skaðum. Tølini siga, at bæði TB, sum endaði næstfremst, og HB, sum endaði á triðja plássi, skoraðu fleiri mál, enn vit gjørdu. Tølini siga eisini, at verjuparturin hjá okkum var væl betri, enn hann var hjá hinum liðunum. Tað fóru bara níggju mál ígjøgnum hjá okkum, meðan tað fóru átjan ígjøgnum hjá TB og tjúgu hjá HB, vísir Meinhardt Dalbúð á.

Nógvu tey síðstu umførini var liðið mannað soleiðis: Ovi Joensen – Kaj Eli Poulsen, Herman Midjord, Kristian Petersen, Áku Petersen – Sonni Jensen, Sam Jacobsen, Abraham Løkin – Jan Nielsen, Meinhardt Dalbúð, Birgir Thomsen.

Eingislki Dave Jones var fremsti maður fyrstu umførini, men so fór hann av landinum. Abraham Løkin var buturstaddur í útbúgvingarørindum. Tí vara hann ikki við í fyrstu umførunum.

-Ronny Gunnarsson úr Svøríki var venjari. Hóast hann bara var 24 ára gamal, so hevði hann framúr gott tak á okkum. Vit fóru beinanvegin eftir nýggjár undir fyrireikingarnar, og vit vandu fýra og fimm ferðir um vikuna. Dystardagar møttu vit klokkan 8.30 at venja eina løtu. At vit vóru í so góðari venjing, og at vit vóru so svangir eftir at røkka tí, sum vit ongantíð áður høvdu megnað, hjálpti heilt væl til, heldur Meinhardt Dalbúð.

At fótbóltsevnini vóru góð hevði ÍF víst við at vinna unglingadeildina í 1975. Fleiri av hesum unglingunum vóru saman við veteranum, sum dugdu væl við ungu monnunum, við til at manna FM liðið:

-Sam Jacobsen og Áku Petersen vóru ávikavíst 31 og 30 ára gamlir. Tað er undarligt við aldri. Nú haldi eg fótbóltsspælarar um tredivu ára aldur at vera upp á tað besta. Í 1979 hildu vit ungu teir báðar vera heilt gamlar. Miðverjin Herman Midjord var 27, Hans Elias Joensen, sum fyrstu umførini var vongverji í høgru, var 26, Birgir Thomsen, sáli, sum var framúr í vinstru, var 24, og so vóru teir flestu av hinum um 20 ára aldur, greiðir Meinhardt Dalbúð frá.

### Ikki bestu fyritreytirnar

At tað skuldi eydnast ÍF at vinna FM var tað ikki nógv, sum bendi á, tá ið tað fyri fjøruti árum síðani varð farið undir 1979 kappingina. HB vann FM í 1978, og TB varð roknað at vera heilt væl fyri, og ÍF hevði ongantíð verið í náand av meistaraheitinum.

Hetta árið varð vøllurin í Fløtugerði gjørdur av nýggjum. Hann var bæði breiðkaður og longdur.

-Tað bar við sær, at vit vandu á Skála og spældu heimadystirnar í Gøtu. Vit skiftust um at koyra út á Skála. Nevndin helt okkum til og tænti okkum soleiðis, at vit kendu umstøðurnar at vera framúr góðar. Petur Simonsen var formaður, Poul Jákup Mohr var kassameistari, og Sonni Jensen, sum spældi við og var liðformaður, var eisini í nevndini. Vit bíðaðu spentir eftir, at vøllurin skuldi verða so frægt liðugur, at tað kundi bera til at spæla heimadystirnar í Fuglafirði, og soleiðis var tað, tá ið vit eftir stutta summarsteðgin fóru undir avgerandi umførini, minnist Meinhardt Dalbúð, hvussu tað var fyri fjøruti árum síðani.

### Avgerandi løturnar

ÍF og TB lógu stavn um stavn í FM stríðnum. Tí var talan um lyklauppgerð, tá ið TB í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin – sunnudagin 12. august – var gestur á umvælda vøllinum í Fløtugerði:

-Hóast líkindini vóru vánalig, so var áskoðarafjøldin heilt stór. Vit vunnu 3-1. Danski venjarin hjá teimum Henning Jensen javnaði við brotssparki, eftir at eg hevði verið so heppin í okkara fyrsta álopi at leggja okkum framum. Í seinna hálvleiki skoraði Birgir Thomsen, sum av álvara var í hopla, tvey mál, minnist Meinhardt Dalbúð.

-So vóru útidystir í Miðvági og Klaksvík á skrá. Í Miðvági vunnu vit 2-0, og í Klaksvík vunnu vit 5-0. KÍ var illa fyri, og vit høvdu bóltin níggju ferðir í netinum, men Nemus kolldømdi fýra mál. So var avbjóðingin, at sigursvanda HB vitjaði í Fuglafirði.

Hóast Jan Nielsen legði ÍF framum, so lá ÍF undir eftir fyrra hálvleik. Kári Nielsen javnaði, og Helgi Olsen stútaði HB framum, eftir at Eyðfinn Lamhauge legði innfyri, skrivaði Sosialurin. Beinanvegin eftir steðgin trýsti ÍF, og tað bar tvey mál og harvið 3-2 sigur við sær. Meinhardt Dalbúð javnaði við høvdinum, eftir at Sonni Jensen hevði lagt innfyri við horna, og átta minuttir undan leikloki skoraði Meinhardt Dalbúð sigursmálið við knænum, skrivaði Sosialurin.

-Aftur hesa ferð var tað avgerandi, at vit vóru í so framúr góðari venjing, minnist toppskjúttin aftur á 1979.

Í næstsíðsta umfari stóð á gomlum nøglum á Vágseiði, men tað eydnaðist Birgir Thomsen at skora einasta málið, tá ið ein tími var farin. Fuglfirðingar fóru til hús við 1-0 sigri. Síðsta umfar var 30. september, og tá hevði ÍF vitjan av B36, sum endaði á fjórða plássi.

ÍF vann 3-1. Meinhardt Dalbúð setti hol á, so javnaði Andreas Vatnhamar fyri B36, og undan steðginum legði Abraham Løkin heimaliðið framum aftur. Tólv minuttir undan leikloki var fagnaðurin øgiligur, tá ið Meinhardt Dalbúð økti til 3-1. Rakettir, kanónsløg og nógv annað fýrverk varð futtað av, tá ið fuglfirðingar fegnaðust um fyrsta og higartil einasta FM heitið, ber til at lesa í Sosialinum.

-TB var bara eitt stig aftanfyri okkum, so vit høvdu knívin á barkanum, tí vit roknaðu heilt víst við, at TB fór at vinna á heimavølli ímóti NSÍ. B36 var væl upplagt, og kanska vóru vit darvaðir av støðuni, men vit vunnu, og vit vóru ógvuliga fegnir, minnist Meinhardt Dalbúð.

1979 er framvegis nakað heilt serligt hjá fuglfirðingum.

*Hagtøl: faroesoccer.com*

## ÍF 1979

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2204 | ÍF - NSÍ | 3-1 | 2207 | NSÍ - ÍF | 0-2 |
| 2904 | TB - ÍF | 1-1 | 1208 | ÍF - TB | 3-1 |
| 2405 | ÍF - MB | 2-0 | 1908 | MB - ÍF | 0-2 |
| 1305 | ÍF - KÍ | 4-0 | 209 | KÍ - ÍF | 0-5 |
| 2005 | HB - ÍF | 2-4 | 1609 | ÍF - HB | 3-2 |
| 2705 | ÍF - VB | 1-1 | 2309 | VB - ÍF | 0-1 |
| 807 | B36 - ÍF | 0-0 | 3009 | ÍF - B36 | 3-1 |

## 1979 støðan

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ÍF | 14 | 11 | 3 | 34 | 9 | 25 |
| TB | 14 | 11 | 2 | 44 | 18 | 24 |
| HB | 14 | 8 | 2 | 39 | 20 | 18 |
| B36 | 14 | 4 | 4 | 21 | 30 | 12 |
| MB | 14 | 3 | 5 | 22 | 27 | 11 |
| KÍ | 14 | 3 | 4 | 18 | 36 | 10 |
| VB | 14 | 1 | 6 | 18 | 33 | 8 |
| NSÍ | 14 | 0 | 4 | 12 | 35 | 4 |

## Málskjúttar 1979

| | | | |
|---|---|---|---|
| Meinhardt Dalbúð ÍF | 17 | Dave R Jones ÍF | 5 |
| Kári Nielsen HB | 11 | Jan Nielsen ÍF | 3 |
| Trond Nolsøe TB | 11 | Abraham Løkin ÍF | 1 |
| Birgir Thomsen ÍF | 6 | Sonni Jensen ÍF | 1 |

## ÍF spælarar 1979

| | Aldur | Dystir |
|---|---|---|
| Ovi Joensen | 21 | 14 |
| Áku Petersen | 30 | 14 |
| Kristian Petersen | 21 | 14 |
| Herman Midjord | 27 | 14 |
| Sonni Jensen | 20 | 14 |
| Birgir Thomsen | 24 | 14 |
| Meinhardt Dalbúð | 20 | 14 |
| Kaj Eli Poulsen | 22 | 13 |
| Jan Nielsen | 21 | 13 |
| Sam Jacobsen | 31 | 13 |
| Abraham Løkin | 20 | 8 |
| Dave R. Jones | 25 | 7 |
| Pól Eldevig | 18 | 4 |
| Hans Elias Joensen | 26 | 2 |
| Finnur Eliasen | 20 | 1 |
| Páll Beder | 25 | 1 |
| Steinbjørn í Lambanum | 26 | 0 |
| Ingimund Hansen | 19 | 0 |
| Jón Nolsøe Olsen | 19 | 0 |

**Venjari**
**Ronny Gunnarsson 24**